# ving og marknaðarføring



*Jastrid Gullaksen er ógvuliga fegin um húsið, hon hevur keypt dygst niðri við sjóvarmálan á Klaksvíkini. – Tey eru út við 100 ára gomul og hava sína søgu. Eg haldi, at plaseringin er so áhugaverd, sigur hon*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Fram til jólar hava vit nógv at gera á Grafia, men tá ið jólini eru løgd aftur um, fara vit so smátt at taka hond um húsini og seta tey í stand til reklamuvirki.

Jastrid er ógvuliga fegin um keypið.

- Húsini, sum eru út við 100 ára gomul, hava sína søgu, og eg haldi, at plaseringin er so áhugaverd niðri við sjóvarmálan.

At síggja til, er húsið, sum hon hevur keypt frá Torbjørn Gaard, ein perla í Klaksvíkini.

Saman við sær á reklamuvirkinum hevur hon Sonju R. Kjølbro, sum er útbúgvin miðlagrafikari og systir sína, Hannefíu.

## Tað visuella

Grafia er ein virkin og fjølbroytt fyritøka, sum tekur sær av sniðgeving og marknaðarføring – ella øllum tí visuella hjá stovnum, handilsfyritøkum, virkjum og einstaklingum.

- Okkara arbeiði spennir rættiliga víða og snýr seg um alt, sum hevur við skrift og litir at gera, eitt nú lýsingar, faldarar, bløð, bøkur, búmerkir og nú eisini heimasíður.

Jastrid sigur, at stovnar og fyritøkur av ymiskum slagi eisini kunnu venda sær til Grafia, sum hjálpir teimum at mynda teirra grafiska og innihaldsliga samleika – ella at finna sálina í virkinum, sum hon tekur til.

Soleiðis veitir Grafia eisini heildarloysnir á ymiskum økjum.

- Reklamur og átøk hava so sanniliga eisini nógv við psykologi at gera, og hetta er ein partur av tí, vit læra á skúlanum, sigur hon.

Grafia er eisini til reiðar at hjálpa og vegleiða fyritøkum, tá ið handilsstevnur eru eins og átøk av ymiskum slagi.

- Vit eru eisini til reiðar at hjálpa til, um ein fyritøka ætlar sær at gera ein film um virksemið, sigur hon.

Jastrid leggur dent á, at tað er bara hugflogið, sum setir avmarkingarnar, tá ið ræður reklamur og átøk, sum øll hava til endamáls at selja meira – ella at vinna fleiri viðskiftafólk.

- Alt, vit gera, er væl gjøgnumhugsað. Tað kann taka sína tíð, áðrenn eitt hugskot búnast. Tú gongur og hugsar um hetta – og so knappliga er tað, tú leitar eftir, bara har, sigur hon.

Grafia umsitir eisini ymiskar prentlutir, eitt nú bøkur og faldarar, fyri viðskiftafólk.

- Okkara viðskiftafólk samstarva bert við okkum, og síðan avgreiða vit tað, sum er at gera. Hava tey brúk fyri málsligari vegleiðing, keypa vit hesa tænastu. Vit taka okkum av øllum smálutum, og tá ið liðugt er, fáa viðskiftafólk lidnu vøruna frá okkum, sigur Jastrid.

## Eisini aðrastaðni

Grafia hevur eisini viðskiftafólk uttanfyri Klaksvíkina.

- Vit arbeiða eisini í Eysturoy og í miðstaðarøkinum, og vit bjóða okkum fram um alt landið, sigur Jastrid.

Hon vísir á, at tá ið hon byrjaði at arbeiða á reklamuøkinum seinnapartin í nítiárunum, vóru fólk ikki so "heit" fyri at brúka reklamufyritøkur.

- Eg kendi tað ógvuliga tungt í byrjanini at skula sannføra fólk um, at hetta er eitt øki, tey eiga at brúka pening upp á fyri at náa einum betri úrsliti. Men hetta kennist munandi lættari í dag, og tað eru nógv fleiri viðskiftafólk á marknaðinum í dag enn áður.

Hon vísir á, at bløðini koma út oftari, og lýsingarmøguleikarnir í loftmiðlunum eru fleiri enn áður.

- Í dag vita fólk, áðrenn tey fara til handils, hvat tey ætla sær at keypa. Tí ræður um hjá stovnum, fyritøkum og handlum at vera úti um seg – og vera við í kappinginini um viðskiftafókini, sigur Jastrid Gullaksen, grafiskur designari, at enda.